## Nýtt savn

Í morgin kemur næsta yrkingasavnið hjá Bergi Rønne Moberg í bókabúðirnar. Tað hevur fingið heitið *Ongar planir fyri næsta sunnudag* og kemur út á Mentunnargrunni Studentafelagsins. Yrkingarnar hjá Bergi Rønne Moberg hava sterkan einstaklingsdám, har trúnaður og fremmandagering er eitt høvuðstema.




## Vencil framløga flutt

Almenna framløgan av skaldskapartíðarritinum Vencili, sum lýst varð at verða í Miðlahúsinum fríggjadagin 5. oktober kl. 17, verður í staðin hinumegin Tórsgøtu, í Sigmundarstovu á Hotel Tórshavn/Hvonn sama dag, somu tíð. Eitt spildurnýtt kvæði er í nýggja Vencili, og tí er nokk so natúrligt, at framløgan verður í Sigmundarstovu. Umframt at farið verður upp á gólv at kvøða nevnda kvæði, fara rithøvundar at lesa upp bæði yrkingar og stuttsøgur úr nýggja Vencili. Hansina Iversen hevur annars gjørt permuna, og er hon gjørd á Grafiska verkstaðnum í Havn.

# Gandakendi gerandisdagurin

**Nógvir av tekstunum í triðja nummarinum av tíðarritinum Vencil mala um vanliga gerandisdagin. Hesin er tó ikki keðiliga gráur, men heldur trøllsliga grábeintur, og burtur úr gerandisligum smálutum rísur hugtakandi list**

SKALDSKAPUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*



*Í nýggja Vencil verður grái gerandisdagurin næstan grábeintur, og gerandisting sum blómur, grønertrar, akvariumfiskar og saksar verða ræðandi gandakend*

Eftir eitt drúgt arbeiðslív í postverkinum fær ein maður sær í loyndum arbeiði í einum djórahandli, meðan ein annar leitar eftir íbúð á svartakjallaramarknaðinum í Havn. Í London situr ein maður í einum undirgrundartoki, í Miðeystri finnur ein eldri maður sær konu, og ein kvinna rennur á einari føroyskari rennibreyt.

Vencil triði, ið júst er komin út, er sum eitt loyndarfult skrín, har nógv ymisk og kanska púra vanlig lív eru pakkað niður í eina lítla føroyska bók. Men sum hesi lív lata seg upp í skaldligum hami, eru tey alt annað enn vanliga keðilig. Í nýggja Vencil verður grái gerandisdagurin næstan grábeintur, og gerandisting sum grønertrar, gularøtur, akvariumfiskar, pappír og saksar verða ræðandi gandakend.

Serliga eru tað stuttsøgurnar hjá Sámali Kristiani Jacobsen, Sólrun Michelsen og Oddfríða Marna Rasmussen sum saman við yrking hjá Hanusi Kamban lýsa uppstegðað menniskjalív, meðan tekstirnir hjá Tóroddi Poulsen og Ron Padgett lýsa, hvussu listin sprettir úr júst tí gerandisliga sjabbinum.

### Trøllbundin parløg

Í stuttsøguni »Eg beri so nógv« hjá Oddfríða Marna Rasmussen liggur alt í fastari legu, hvør dagur hjá Harra Rubeksen er líka, og konan snorkar á sama hátt hvørja nátt. Grái gerandisdagurin er beinleiðis trøllsligur, og Harra Rubeksen vil flýggja. Men spennandi ævintýr eru tíverri ikki til, og lívsuppgerðin endar við einum skemtiligum antiklimaksi.

Stuttsøgan, Marrumyndir, hjá Sámal Kristian Jacobsen er eisini um eitt par, sum hevur mist samband við hvønn annan. Maðurin hyggur at konu ella gentu síni, sum situr og klippir páppírsmyndir á køksgólvinum. Hann er á veg út at hyggja eftir einari íbúð, og sum vanligt er í Føroyum, er tað ein kjallaraíbúð, hann skal hyggja eftir. Men hetta er ikki bara ein vanlig íbúðarframvísing, men heldur ein niðurgongd til eitt voodookent marruland.

### Fastlæsta traðkilagið

Blandinginavtígerandisliga og óveruliga sermerkir eisini stuttsøguna hjá Sólrun Michelsen, men í einum heilt øðrum formi. Vit eru á lívsins rennibreyt, har øll renna runt og runt. Her eru børn sum spæla blunda og krógva, ungar gentur í leystbundnum stjørnumynstrutum troyggjum, ungar kvinnur við týdningarmiklum størvum og húsum, sum kosta eitt lív og lívsklókar eldri kvinnur. Frásøgufólkið rennur seg ígjøgnum lívið og ikki fyrr enn í móti endanum spyr hon seg sjálvan, hví hon rennur, og hví hon rennur eftir einari fastlagdari breyt.

Hanus Kamban kemur inn á sama tema í aðrari av yrkingum sínum. Persónurin ferðast í undirgrundartoki í London, meðan hurðar og møguleikar flúgva fram við.

Eins og kjallaraíbúðin hjá Sámal Kristian Jacobsen er undirgrundartokbreytin meira enn bara eitt hol í jørðini. Við minnum um millum onnur Sylviu Plath og Arthur Koestler, sum bæði gjørdu sjálvmorð, berjist hann ímóti mótloysinum, men hóast tokið fer við rúkandi ferð, flytur persónurin seg í veruleikanum ikki úr stað.

### Vónríka hugflogið

Í fleiri tekstum verður ró fram undir, at vónin býr, har deyðin og vónloysið førir til eina nýggja byrjan. Og mitt í myrkrinum ber til at skapa ljós við at síggja og seta orð á alt tað dapra.

Í yrkingini hjá Hanusi Kamban liggur vónin í listarligu eygleiðingi. Persónurin í London fer ikki í holt við lívið, men hann ynskir at eygleiða alt: mammur geva børnum matpakkar á Hampstead Heiði, og pápar hjálpa synum at spæla við drekar á Primrose Hill. Og í eygleiðingi av nýggjum lívi liggur nýggj vón.

Yrkingarnar hjá Ron Padgett – sum annars hava uppiborið eina grein fyri seg – kunnu lesast sum livandi dømi um, hvussu listin gevur gerandisdegnum nýtt lív við at sorla hann sundur í smálutir. Eins og kvinnan í stuttsøguni hjá Sámal Kristian Jacobsen pettar Padgett marrunar sundur og setur tær saman aftur sum list.

Í niðurskrivaði fyrilestrinum við stuttliga undirheitinum »tá tú hevur tikið fepurin, hevur tú longu tað at skriva um« hugleiðir Tóroddur Poulsen um sambandið millum gerandisligir ræðuleikar, undarligir dreymar og góðar yrkingingar. Og eisini her hómast vónin í kreativu mótstøðuni móti fastlæstu siðvenjuni. Hann minnist millum annað eina stranga lærarindu úr barnaskúlanum:

»Minnist eina aðru ferð í rokning; tá royndi merin at trútta niður í okkum, at tað eitur ikki fýrakantað, tað eitur fýrskantað. Tá letur í einariannarsrættiligasmædnari gentu: hálvfemskantað! Og tá kom fanin aftur í gomlu og klask! klask! og klask! og enn einaferð klask! og klask! Gentan fekk fleiri lúsingar, meðan gamla rópti fýrskantað! hoyrir tú! klask! klask! fýrskantað!«

*børnini skreiða*
*við málinum sum sletu*
*á gomlum kava*

**Tóroddur Poulsen**